UTTAN ÚR HEIMI

## ES revsar norskar laksaútflytarar

ES-nevndin hevur boðað tíggju norskum laksaútflytarum frá, at teir sleppa ikki at selja laks á ES-marknaðinum, tí teir hava brotið reglurnar um minstaprís á norskum laksi til ES.

Sambært ES-nevndini brutu teir tíggju útflytararnir reglurnar seinasta heyst, tá teir sendu nógvan laks á ES-marknaðinum fyri ein prís, sum er væl niðan fyri minstaprísin. Júst seinasta heyst var marknaðarprísurin niðan fyri minstaprísin.

Sambært norskum bløðum sleppa teir tíggju norsku útflytararnir ikki at selja ES laks, so leingi verandi reglur eru í gildi. Galdandi sáttmáli millum ES og Noreg fer úr gildi 30. september, men verður eftir ætlanini longdur nakrar mánaðir.

## Bush er ein vandi

Amerikanski búskaparfrøðingurin Joseph Stiglitz vil vera við, at George W. Bush, forseti er ein vandi fyri heimsbúskapin.

Stiglitz, sum var ráðgevi hjá Clinton forseta, og sum hevur fingið Nobel-virðirløn í búskapi, sigur, at Bush er ein størri vandi fyri heimsbúskapin enn teir, sum stilla upp til forsetavalið í Brasilia. Hevði eg skulað valt millum Bush og brasilska valevnið Luiz Inacio da Silva, hevði eg valt Silva, sigur Joseph Stiglitz við brasilska blaðið O Globo.

Stiglitz sigur við blaðið, at Bush forseti hevur ongan kunnleika til búskap, og at hann hevur ikki handfarið búskapin við tí varsemi, sum er neyðugt.

## Krevur bótina aftur

Teir, sum áttu norska nótaskipið Torson, krevja nú, at norski ríkiskassin skal endurrinda teimum eina bót upp á 1,2 milliónir krónur, sum reiðaríið fekk, tá skipið varð tikið og dømt fyri at hava brotið veiðireglurnar seinasta vetur.

Reiðaríið Jakobsen & Sønner vil vera við, at talan var um tvífalda revsing, tí umframt bótina til reiðaríið misti Torson fiskiloyvið í átta vikur. Reiðaríið vil vera við, at fiskibannið kostaði skipinum og reiðarínum millum átta og tíggju milliónir krónur.

Grundgevingin fyri at krevja bótina afturgoldna er ein regla í evropeisku mannarættindalóggávuni, sum sigur, at tvífald revsing er ólóglig. Sakførarin hjá reiðarínum vísir á, at norski hægstirættur hevur ásett, at fólk, sum fáa revsiskatt, kunnu ikki samstundis fáa bót ella aðra revsing afturat. Sakførarin heldur, at málið við Torson og Jakobsen & Sønner líkist einum tílíkum máli, og tí krevur hann, at ríkiskassin skal rinda reiðarínum bótina aftur.

## Helt struts vera mann

Ein kvinna í týska býnum Hamburg ringdi um vikuskiftið til løgregluna og kærdi seg um, at ein maður gekk hálvnakin uttan fyri íbúð hennara.

Kvinnan vildi vera við, at maðurin var nakin oman fyri miðjuna, og hon hevði sæð tveir stórar hvítar blettir stara inn í íbúðina. Eisini helt hon, at maðurin hevði pikkað upp á rútin.

Løgreglan í Hamburg skilti beinanvegin, at talan var ikki um ein mann, men heldur um ein struts, sum var rýmdur í djóragarðinum í býnum. Løgreglan kom tó á staðið, men fann ikki strutsin, og so seint sum í gjár var hann ikki funnin.

# Toppfundurin settur

**– Eitt heimssamfelag, sum byggir á fátækradømi fyri tey flestu og ríkidømi fyri tey fáu, er ikki burðardygt, segði suðurafrikanski forsetin, Thabo Mbeki, tá hann setti ST-fundin í gjár.**

ST-FUNDUR
*Árni Joensen:*



*Sum altíð hjá lond møtast til fundar, eru tað fólk, sum mótmæla heimspolitikkinum. Soleiðis var eisini í Johannesburg, tá toppfundurin varð settur, menn manssterk løgreglulið forðaðu mótmælisfólkinum at sleppa fram at fundarhølunum.*

Løgreglumenn í túsundatali stóðu á varðhaldi, tá ST-ráðstevnan um burðardygga menning varð sett í suðurafrikanska býnum Johannesburg fyrrapartin í gjár.

Tað var suðurafrikanski frosetin, Thabo Mbeki, sum helt setanarrøðuna. og hann duldi ikki fyri, hvørju mál ráðstevnan eigur at seta sær.

– Eitt heimssamfelag, sum er grundað á ein fátækan meiriluta og ein ríkan minniluta ella ríkar oyggjar í einum fátækum havi er ikki eitt burðardygt heimssamfelag, segði suðurafrikanski forsetin.

Thabo Mbeki segði, at heimssamfelagið hevur havt ógvuiliga trupult við at seta í verk tær nógvu og vøkru samtyktirnar, sum eru gjørdar.

– Tí liva vit framvegis eins og í djóraríkinum, har tað er tann sterkasti, sum vinnur, segði Thabo Mbeki.

Eygleiðarar í Johannesburg hava heldur ikki tær bestu vónirnar um, at nakað stórvegis framstig fer at henda á fundinum har. Nógv bendir tó á, at flestu londini kunnu semjast um ávís stig, men at vantandi stuðul frá ávísum londum kann forkoma teimum góðu ætlanunum.

# Mugabe nýtir neyðtøku sum hevnd

**Sum lið í einari politiskari hevnd hjá Robert Mugabe, forseta verða fleiri hundrað gentur og ungar kvinnur verða neyðtiknar í Zimbabwe.**

ZIMBABWE
*Árni Joensen:*

Mannarættindasakførarar í Zimbabwe siga, at tað nýggja átakið hjá forsetanum er einki annað en skipað politisk hevnd, sum hevur til endamáls at beina fyri allari politiskari andstøðu í landinum.

Frances Lovemore, sum starvast sum sakførari hjá einum stovni á lærda háskúlanum í høvuðsstaðnum Harare, sigur við bretska blaðið The Telegraph, at ungir hermenn í stjórnarherinum neyðtaka gentur niður í tólv ára aldur, tí foreldur teirra hava eina aðra politiska hugsan enn forsetin og flokkur hansara. Stovnurin roynir nú at savna sjónbandaupptøkur, sum ætlanin er at nýta sum próvtilfar fyri at fáa Robert Mugabe drignan fyri ST-mannarættindadómstólin í Haag.

The Telegraph hevur gjørt sínar egnu kanningar í Zimbabwe, og blaðið sigur seg hava funnið fleiri neyðtøkulegur, sum ungdómsherurin og tann serliga uppreistrarløgreglan hava bygt. Kvinnur, sum eru slopnar til rýmingar úr legunum, hava greitt blaðnum frá, at tær vórðu neyðtiknar fleiri ferðir, og summar teirra vórðu eisini brennimerktar.

Grundgevingin var, at foreldrini hjá kvinnunum og skyldfólk teirra høvdu atkvøtt fyri andstøðuvalevninum á forsetavalinum, sum var í Zimbabwe í vár.

Ein fyrrverandi hermaður hevður greitt The Telegraph frá, at hann og hinir hermenninir fingu boð um at gera seg inn á konur og døtur hjá andstøðupolitikarum, og at teir eisini fingu boð um at oyðileggja matin hjá fólki.

Mannarættindafelagsskapir halda, at endamálið við tí veksandi harðskapinum er at reka fólk av landinum, beina fyri øðrum og at noyða tey seinastu at gera eftir boðum frá stýrinum hjá Mugabe. Felagsskapirnir vísa í hesum sambandi á, at ein av næstu ráðgevum forsetans, Didymus Mutasa, hevur sagt, at tað rætta hevði verið at skert fólkatalið í landinum úr teimum verandi tólv til seks milliónir.

Í seinastuni hevur umheimurin vent sær ímóti Robert Mugabe, tí hann hevur rikið hundraðtals hvítar bøndur av gørðunum, men andstøðan í landinum sigur, at landbúnaðarnarskipanin, sum forsetin tosar um, er ikki annað enn eitt skálkaskjól fyri at fjala ágangin ímóti andstøðuni.

– Hetta snýr seg hvørki um hvít ella svørt ella um jørð, men heldur um ein einaræðisharra, hvør mál er at drepa og niðurbinda alla politiska mótstøðu, sigur bóndin Roy Bennet, sum er ein av andstøðulimunum í zimbabwiska tjóðartinginum.



# Organistur í ein mansaldur

**81 ára gamli Líggjas Eliasen hevur verið urguleikari í Mikladals kirkju síðan hann var smádrongur. Hann var bara 11 ára gamal, fyrstu ferð hann spældi til gudstænastu í kirkjuni**

KIRKJA
*Jón Brian Hvidtfeldt*



*81 ára gamli Líggjas Eliasen hevur verið fastur organistur í Mikladals kirkju í 64 ár. Tó eru 70 ár síðan hann fyrstu ferð spældi til gudstænastu í kirkjuni*

*Mynd: Finnur Justinussen.*

Fyri 81 ára gamla Líggjas Eliasen í Mikladali hevur sessurin við urguna á loftinum í kirkjuni sín serliga týdning. Har, við rygginum móti altartalvuni hjá J. Waagstein av árabáti í ringum sjógvi, hevur hann í ein mansaldur sitið og spælt til gudstænastu, barnadóp, brúðarvígslu og jarðarferð. Sunnudag eftir sunnudag situr hann og spælir á Leo Rechnagel traðki-orglið í gomlu kirkjuni.

Tá Líggjas var smádrongur var Marius Johannesen lærari í Mikladali og á Trøllanesi, og tað var hann, sum lærdi 10 ára gamla Líggjas at spæla á urguna. Og tá Líggjas var 11 ára gamal, spældi hann fyrstu ferð til gudstænastu í kirkjuni í Mikladali.

Líggjas greiðir frá, at tað var spennandi at sleppa at spæla til gudstænastuna. Árið eftir giftust Jóna og Marius Johannesen í Mikladals kirkju, og tá varð Líggjas biðin at spæla til vígsluna. Hann minnist, at N.J. Rasmussen var prestur í Mikladali um hetta mundið. Ungdómsárini spældi Líggjas ofta í kirkjuni, og í 1937 varð hann biðin at vera fastur urguleikari. Hann var tá 16 ára gamal. Síðan er nógv vatn runnið í ánni, og Líggjas minnist seg hava spælt bæði til barnadóp og brúðarvígslu hjá summum av bygdafólkunum, og eisini hava fleiri prestar verið í prestadøminum hesi árini. Pápi hansara var degnur í Mikladals kirkju í umleið 60 ár, og tíðum vóru tað tí faðir og sonur, sum stóðu fyri gudstænastuni.

– Tá eg byrjaði at spæla, vóru allir sálmarnir á donskum. Hóast tað í dag verður sungið á føroyskum, so eru mong av løgunum enn tey somu, greiðir Líggjas frá. Tó kemur fyri, at nýggj løg verða gjørd til gomlu sálmarnar, ella at nýggir sálmar við nýggjum løgum vera at syngja.

– Er okkurt nýtt lag til gudstænastuna sunnudag, so plagi eg at fara niðan í kirkjuna leygarkvøld at venja eitt sindur, sigur Líggjas. Hann hevur tó ikki fyri neyðini at venja so nógv, tí sum oftast sita løgini skjótt. Tó kann vera tungt at spæla nýggju løgini til gudstænastuna, tí kirkjufólkið kennir ikki løgini frammanundan, og hevur tí trupult at syngja við. Burtursæð frá tí, sum Marius Johannesen lærdi hann at spæla sum smádrong, er Líggjas sjálvlærdur urguleikari. Honum dámar væl at spæla, og tí fellur tað ikki so tungt at læra seg nýggj løg. Hann greiðir frá, at vanliga verða tveir av sálmunum, sum hoyra til lesturin ávísa sunnudagin, sungnir til gudstænastuna, meðan hann sjálvur, saman við presti ella degni, velur hinar. Mikladalur hoyrir til prestadømið í Klaksvík, og í meðal er prestur í bygdini eina ferð um mánaðin.

Mikladals kirkja er frá 1859, men í 1915 varð yvirtromin tikin av, og veggirnir hækkaðir nakað. Herfyri fór takið á kirkjuni at leka, og í síðstu viku varð nýtt aluminiumstak lagt á. Líggjas Eliasen greiðir frá, at fyrsta orglið kom í kirkjuna í 1890'unum, men í 1953 varð tað skift út við nýtt orgul av slagnum Leo Rechnagel frá Haslev Orgelfabrik. Gamla orglið varð tó ikki blakað burtur, men stendur enn í einum húsum í bygdini. Talan er tó ikki um eitt pípuorgul, men eitt »traðki-orgul«.

Síðan Líggjas Eliasen byrjaði at spæla í kirkjuni, er fólkatalið í bygdini minkað nógv.

– Undir krígnum og í fimmtiárunum búðu 130 fólk í Mikladali, men nú eru bara 50 eftir, greiðir hann frá og leggur afturat, at tað sæst sjálvandi aftur í kirkjuni. Vanliga eru umleið 20 fólk til gudstænastu í Mikladali. Eisini er brøðrasamkoman í bygdini, og har hava nøkur av bygdafólkunum sína gongd.

### Eingin at taka við

70 ár eru liðin síðan Líggjas Eliasen fyrstu ferð spældi til gudstænastu í Mikladals kirkju. Sum yngri arbeiddi hann eitt ár í Hoyvík og hálvt annað ár hjá Kjølbro í Klaksvík, men hevur annars verið fastur urguleikari í Mikladals kirkju í samfull 65 ár. Nú hann verður 82 ár næstu ferð, hevur Líggjas hugsað um at gevast við at spæla.

– Jú, eg havi hugsað um at gevast, men her er eingin at taka við. Eg plagi at biðja ein annan mann úr bygdini spæla í kirkjuni, tá tað ikki liggur fyri hjá mær, men hann er 77, leggur Líggjas smílandi afturat.



*Í ein mansaldur hevur Líggjas Eliasen havt sín fasta sess við urguna á loftinum í Mikladals kirkju.*

*Mynd: Finnur Justinussen*